Sunnudagin var stórur hátíðardagur í Skálavik í sambandi við at kirkjan í bygdini í ár hevur 100 ár á baki. Undir hátíðargudstænastuni talaði Hans Jákup Joensen, biskupur, og Jákup Reinert Hansen, søknarprestur, prædikaði. Um kvøldið varð altargudstænasta við Bergi Jacobsen, fyrrverandi søknarpresti í Sandoynni.

Nógv fólk hevði leitað sær í kirkjuna henda hátíðardagin. Vit prenta tær báðar prædikurnar, sum hildnar vóru í Skálavikar kirkju sunnudagin.

Vit lurta ov lítið

– Tað er ein óhugnaligur veruleiki, at vit lurta alt ov lítið eftir okkara meðmenniskjum – vit hoyra tey tosa, men, vit lurta ikki – og vit eru umgird av einsomum skapningum, sum ongantíð fáa ordið fyri seg. Og tá ið ástendur, tá fólk gerast ólikiliga sjúk, tá deyðin er í hondum, ella tá hann longu hevur vitjað, so rædast vit tøgnina, og fara at vøsa um alt annað enn støðuna, sum hon er – og eftir sita tey sjúku, tey doyggjandi ella tey syrgjandi í størsta einsemi, segði Bergur Jacobsen m.a. undir altargudstænastuni í Skálavikar kirkju seinasta sunnudag.

– Størsta uppgávan hjá kirkjuni og kristnum menniskjum í hesum dagum er tann, at lurta, segði hann í prædiku síni, sum vit prenta í heilum líki:

100 ára dagur í Skálavik, 15. e. trin. 1991
(Lukas 10.30 og út)

Hesa myndina, sum Lukas málar fyri okkum, um tá Jesus var og vitjaði inni hjá systrunum Martu og Mariu, hana kenna vit so sera væl – men, júst hvat Jesus hevur í huga, tá hann sigur: «eitt er neyðugt» og at «Maria hevur valt hin góða lutin», tað kunnu tey bibliukønu ikki semjast um.

Men, kanska eiga vit her, sum altíð tá vit lesa skriftina, at lita at heildini – at taka alla myndina hjá Lukasi við og baktjaldið eisini – – tí so kann tað verða, at vit fáa eina hóming av, hvat ið Lukas vil siga okkum við hesi frásøgn.

Jesus er á veg niðan til Jerusalems – hetta er óivað seinasta ferð hansara til Halga staðin; og helst hevur hann kent á sær hvat ið var honum í vænti. Fjøldin strongdi á, og vildi hava hann upp í part við sær; myndugleikarnir høvdu ringt eyga á honum – og at tey, sum stóðu honum nærmast ikki skiltu hann, tað vita vit frá tí sum hendi seinastu náttina í lívi Jesusar, tá tey flestu av teimum rýmdu og goymdu seg í ræðslu og vónloysi.

Nógv fólk høvdu leitað sær í kirkju til hátíðarhaldið

Vilhjálmur Tindskarð, vanliga nevndur Vilhjálmur av Hamri, er ein av elstu núlivandi skálvikingum. Her er hann á veg í kirkju í sínum meira enn 30 ára gamla Porse-traktori, sum hevur verið honum sera hentur oll hesi árini

Jesus skuldi undir eitt stórverk – men, ein tilík byrða kann verða øgilig; og tey, sum tora at berjast fyri ti tey trúgva á, sum eru tíl reiðar at offra alt fyri at fremja lívsverk sítt, tey gerast tíðum sera, sera einsamøll – og ongin treingir sum júst hesi menniskjuni til vinir í neyðini. Og tað er helst eisini ti, at Jesus fór á gátt hjá teimum báðum systrunum, Martu og Mariu – hann var troyttur, einsamallur og bangin; og hann trongdi til hvílu eina løtu.

Nú eru vit menniskju so ymisk í øllum lutum – og Guð fái lov fyri tað, ti tað er bruk fyri øllum slógum av fólki! Marta og Maria hava óivað verið so ymiskar, sum systrar og systkin nú einaferð kunnu vera.

Onnur loypir upp at stákast, tí fremmandur er komin í húsið – hin setur seg at práta við gestin. Bæði skulu til! Hvørki kirkjan, ella gerandisdagurin í síni heild, hevði kunnað hildið fram, uttan tey vælsignaðu menniskjuni, sum ikki smæðast fyri at taka eina hond í, og at fara til verka.

Nú er tað soleiðis í veruleikanum, at tey flestu av okkum hava onki val, vit noydast at stákast hvønn dag fyri at yvirliva – og hjá summum gerst gerandisstrevið eitt endamál í sær sjálvum. Vit hava umgirt okkum við so mongum og dýrum lutum, og vit krevja so nógv, at vit skjótt ikki hava stundir at liva, um vit skulu náa alt tað, vit ynskja og gjalda hvørjum sítt.

Tað at stákast bæði inni og úti, er gott, men tað kann eisini vera ein flýggjan undan gerandisdegnum og undan lívsins veruleikum og gátum – tað eru so ótrúliga nógv fólk, sum ræðast friðin, kvirruna og tað at hvíla seg. Og hetta sæst aftur í tí andaliga lívinum hjá okkum.

Tá ið vit hugsa um tað andaliga lívið og um uppgávuna hjá kirkjuni, so taka vit tað sum eina sjálvfylgju, at hin munnligi vitnisburðurin og prædikan er hin mest týðandi tátturin í andaliga lívinum og lívinum hjá kirkjuni.

Sjálvandi skulu vit prædika, og sjálvandi eiga tey, ið ynskja tað, at fáa loyvi til at bera fram ein munnligan vitnisburð um trúarroyndir síndar! Sjálvandi!

Men, samstundis, so er tað ein veruleiki, at ein av høvuðsuppgávunum hjá kirkjuni og kristnum menniskjum, er tað at lurta – at lurta eftir meðmenniskjunum, og at lurta eftir Guði.

Treytin fyri at vit kunnu siga nakað við menniskju, er hon, at vit fyrst lurta eftir teimum – at vit lurta eftir hvat ið liggur teimum á hjarta, hvat ið rørist innan í teimum. Lurta vit ikki fyrst eftir menniskjum, so hava vit heldur onki at siga við tey – kenna vit ikki støðu og tørv teirra, so kunnu vit heldur ikki hjálpa teimum.

Tað er ein óhugnaligur veruleiki, at vit lurta alt ov lítið eftir okkara meðmenniskjum – vit hoyra tey tosa, men, vit lurta ikki – og vit eru umgird av einsomum skapningum, sum ongantíð fáa ordið fyri seg. Og tá ið ástendur, tá fólk gerast ólikiliga sjúk, tá deyðin er í hondum, ella tá hann longu hevur vitjað, so rædast vit tøgnina, og fara at vøsa um alt annað enn støðuna, sum hon er – og eftir sita tey sjúku, tey doyggjandi ella tey syrgjandi í størsta einsemi.

Vit hitta hvønn dag bangin menniskju – menniskju, sum hava mist lívsdirvið, og sum onga vón ella kós hava her í lívinum – men vit lurta ikki eftir teimum, vit geva okkum ikki stundir til teirra, og tí fylla tey seg við tablettum og rúseitri av ymiskum slagi.

Vit hava vanliga sagt, at høvuðsuppgávan hjá kirkjuni og kristnum menniskjum, tað er at boða hin heilaga boðskapin; tað er at prædika og bera vitnisburð.

Men, sum longu nevnt, fortreytin fyri at vit kunnu siga nakað av týdningi við menniskju, tað er at vit fyrst seta okkum niður og lurta eftir teimum og virða tey, sum heilar skapningar – og eg fari enntá at siga, at júst í hesum døgum er størsta uppgávan hjá kirkjuni og kristnum menniskjum tann, at lurta.

Jesus kom móður og troyttur inn til tær báðar systrarnar – onnur fór upp at stákast, hin setti seg at lurta – bæði skulu til. Latum okkum ikki gloyma at geva okkum stundir til at taka okkum av meðmenniskjunum og at lurta eftir teimum, uttan støðugt at leggja teimum orð í munnin. Tað er okkara uppgáva at boða sannleikan í Jesusi, men, tað er ikki okkara uppgáva at døma og at fordøma.

– – –

Men, tað er nú ikki einans meðmenniskjunum, vit eiga at lurta eftir – vit eiga eisini at lurta eftir Guði, og tað er vissuliga ongin sjálvfylgja. Tí eins og vit leggja meðmenniskjunum orð í munnin, tá vit lurta eftir teimum, somuleiðis leggja vit Guði orð í munnin!

Tá vit fara at leita í skriftini. so er tað aloftast fyri at finna prógv fyri okkara egnu hugsanum og fordómum – tað eru bert tey allar fægstu, ið geva sær stundir til veruliga at lurta eftir Guði í skriftini, í gudstænastuni ella í tørvi meðmenniskjans.

Tá ið vit til dømis hugsa um bøn, so hugsa vit vanliga um biddaragongd hjá Guði – og onki ónt um tað, sjálvandi eiga og kunnu vit ikki krógva nakað fyri Skaparanum og okkara innastu lund, og hvaðar skulu vit venda okkum, tá á stendur, uttan til Alfaðirin – men, bøn eigur ikki bert at vera biddaragongd, og ei heldur bert lovsongur. Ein hin mest týðandi tátturin í bønini, og í kristinlívinum, sum heild, er at lurta eftir Guði, at geva sær stundir til tær kvirru løturnar, tá vit leggja allan menniskjaligan stoltleika og allar fordómar frá okkum, og lata okkum upp, og lova hinum trieiniga Guði inn í sál og gerandisdag okkara.

Tað finnst eitt ótal av menniskjum, ið kalla seg kristin, men sum aldrin geva sær stundir til at lurta eftir Guði ella menniskjum – og tað eru hesi, sum beina fyri kristindómínum!

»Biða í kvirru, sál mín, Guði«, sigur skaldið í sálna 62.6 – tað at lurta eftir Guði, Jesusi, andanum og medmenniskjanum, tað er ein livsháttur. Og sonn bøn, hon umfatar jú alt liv okkara, og ikki bert bønarstundirnar. Tað at lurta eftir Guði, tað er eitt liv livað í eydmýkt, har vit ikki bert hugsa um okkara egna tørv og dýrka okkara egnu meiningar – men tað er eitt liv livað í størstu virðing fyri Guði og øllum tí, sum hann hevur skapað.

Bergur Jacobsen, fyrrverandi søknarprestur í Sandoynni, var sera væl damdur sum prestur í oynni í síni tíð. Tað eru tí eisini altið boð eftir honum, tá okkurt serligt er á vási sum eitt nú hátíðarhald sum hetta. Her heilsar Bergur uppá nøkur av kirkjufólkunum



Kirkjan í miðjum fólkinum

100 ára dagur í Skálavik, 15. s.e. Trin., 1. rað
Matt. 6,24–23

»Har liggur so bygdin, rúmsátt og viðopin í degnum. Fjøllini uttanum eru eingin stongsil nakrar vegir, men bert ein varligur vøllgarður, ið avmarkar lækkan, sum bygdin liggur í. Bøurin breiðir seg yvir alt tað rúma slættlendið í dalinum og langt niðan í hallarnar fyri norðan og sunnan. Út um henda víða bein liggja so tey hálvthundrað húsini slødd, nøkur fá saman í býlingum, og langt imillum. Ein stór á, ið førir alt vatnið úr hesum víða dalinum til sjóvar, rennur miðskeiðis gjøgnum lágan. Her er øki og ándarúm í bygdini».

Soleiðis skrivar Hans Jacob í Stovuni, uttan fyri bogarðarnar betur kendur undir navninum Heðin Brú, í vøkru og beinraknu lýsing síni av Skálavík. Her er øki og ándarúm. Og kemur tú so til bygdar og spyrt eftir kirkjuni, nýtist tær ikki at leita leingi. Tá nýggj kirkja skuldi byggjast fyri hundrað árum síðani, varð gjørt av at flyta úr gamla kirkjugarðinum niðri á Møl og niðan í miðja bygdina, har rúm-

– Tað er ein góð støða hjá eini kirkju at hava, at vera mitt ímillum menniskjuni. Í kirkju mátti farast tá gleðin var stór og tá sorgin var tung og nívandi og ongi onnur ráð vóru til at taka enn at tveita sínar byrðar á Harran. Kirkjan í miðjum fólkinum, segði Jákup Reinert Hansen m.a. í prædiku síni í Skálavikar kirkju sunnudagin. Vit prenta prædikuna í heilum líki:

➧

Myndir kalmar

Skálavíkar kirkja 100 ár